Álit

í

løgtingsmáli nr. 10/2023: Uppskot til løgtingslóg um at byggja H-bygningin á Landssjúkrahúsinum lidnan

Landsstýriskvinnan í heilsumálum, Margit Stórá, hevur lagt málið fram 7. september 2023, og eftir 1. viðgerð 19. september 2023 er tað beint Fíggjarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 17. og 19. oktober 2023.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við landsstýriskvinnuna í fíggjarmálum, Ruth Vang, løgmann, Aksel V. Johannesen, og í tveimum umførum landsstýriskvinnuna í heilsumálum, Margit Stórá, saman við Landsverki.

Við lógaruppskotinum verður biðið um materiella heimild at gera H-bygningin lidnan. Við gjøgnumgongd av bygninginum er komið framá nøkur bygningsarbeiðir aftrat, og harumframt hevur arbeiðið drigið út, og tað hevur fleiri byggiplássútreiðslur við sær. Tí verður mett neyðugt at biðja um eina materiella heimild á 43,7 mió. kr. Peningurin er settur av í fíggjarlógaruppskotinum fyri 2024.

Umraðfestingar
Fyri at stígur ikki skal koma í verkætlanina og fyri, at arbeiðsplássið ikki skal verða lagt stilt, eru umraðfestingar gjørdar í verkætlanini. Tað eru serliga tekniskar skipanir, sum eru tiknar framum í raðfestingunum, tí hesar fevna fyri ein stóran part um allan bygningin og taka drúgva tíð at gera. Hesir partar eru týðandi fyri, at H-bygningurin kann verða tikin í nýtslu.

Orsøkin til at til ber at gera hesar umraðfestingar er, at ikki øll játtanin til tól, útgerð og innbúgv, eins og til háisolatiónsstovur var brúkt ella bundin av avtalu við arbeiðstakara. Arbeiðið hevur verið skipað soleiðis, at tey økir, har bygningurin skjótt kann verða tikin í nýtslu, eru raðfest. Harumframt eru tey tól raðfest og bíløgd, har veitingartíðin er long, meðan onnur útgerð, tól og innbúgv eru útsett.

Arbeitt verður við at yvirtaka og royndarkoyra ymiskar tekniskar skipanir og annað.
Nevndin hevur fingið upplýst, at umleið 1/3 av bygninginum (4.944 fermetrar) eru tiknir í nýtslu, harav størsti parturin seinastu mánaðirnar. Eitt nú stórkøkurin, rehabiliteringin og endurvenjingin og tøkni-hæddin H 3. Næst kemur seingjavask við goymslutorni til sengur og 10 seingjastovur.

Nevndin hevur viðgjørt spurningin um umraðfestingina av verkætlanini við landsstýriskvinnuna í fíggjarmálum og fingið upplýst, at hetta er gjørt í samráð við Fíggjarmálaráðið, ið metir, at heimild er at umraðfesta, tá ið ongar bindingar eru í samband við játtanina, og tá raðfestu arbeiðini hava materiella heimild í galdandi verklagslóg.

Rakstur av bygningi
Ein annar spurningur, ið hevur verið umrøddur, er rakstur av bygninginum. Fyri nevndini er staðfest, at góðar 10 mió. kr. vórðu brúktar til rakstur av H-bygninginum í 2022. Hetta vóru vanligar rakstrarútreiðslur av pørtum av bygninginum, sum sambært avtalu millum Landsverk og Sjúkrahúsverkið vórðu yvirtiknir til vanliga raksturin.

Tó er framvegis byggiplássrakstur av stórum pørtum av bygninginum, og í hesum lógaruppskoti eru 4 mió. kr. til rakstrarkostnað (SEV, LV-starvsfólk, vaktarhald og reingerð) og 6,3 mió. kr. til byggiplássrakstur í longdari byggitíð í tíðarskeiðnum mars 2023 - mars 2024.

Longri byggitíðin verður, tess hægri verður kostnaðurin, tí byggiplássrakstur er altíð tongdur at byggitíðini.

Sambært Fíggjarmálaráðnum hoyrir rakstur av bygninginum til verklagslógina, so leingi bygningurin ikki er yvirtikin av Landssjúkrahúsinum; so hvørt sum partar av bygninginum verða yvirtiknir, skal raksturin fylgja við til Landssjúkrahúsið, sum eisini er hent í hesum føri.

Isolatiónsstovur
Tað er upplýst fyri nevndini, at avgerð er tikin um at fara frá ætlanini um háisolatiónsstovur til vanligar isolatiónsstovur. Hetta er bíligari og verður mett at verða nøktandi fyri tørvin, ið kann væntast at verða hesum viðvíkjandi.

Í tíðarskeiðum, tá tørvur ikki er á stovunum sum isolatiónsstovur, verða tær nýttar sum vanligar seingjarstovur, og verða tí áhaldandi partur av virkseminum í bygninginum.

Fermetraprísur
Nevndin hevur fingið upplýst, at fermetrakostnaðurin íroknað bygging, ráðgeving og aðrar kostnaðir fyri allan H-bygningin, íroknað játtanin fyri víðkaða partin av kjallaranum, er kr. 46.890 og at verður umbidna meirjáttanin á 43,7 mió. kr. latin, verður kostnaðurin kr. 49.713 fyri fermeturin. Talan er samlað um 15.483 fermetrar og 769,7 mió. kr.

Í summum undanfarnum verklagslógum hava arbeiðir aðrastaðni á Landssjúkrahúsinum verið í somu verklagslógum sum arbeiðir, knýtt til H-bygningin, og tað hevur eftir upplýsingunum hjá nevndini verið við til at skapa órógv um brúktar upphæddir til byggingina.

Nevndin hevur fingið upplýst, at umbidna játtanin fyri 2024 á 43,7 mió. kr. er tann upphæddin, ið er neyðug at gera H-bygningin lidnan og kláran at taka í nýtslu. Nevndin fekk eisini upplýst, at neyðugt verður ikki við øktari játtan, uttan so at broytingar verða gjørdar í verkætlanini.

Nevndin hevur eisini havt fund við løgmann, Aksel V. Johannesen, um ætlaninar at endurskoða verandi leist fyri skipan av byggiverkætlanum.

Nevndin er samd um, at tað er neyðugt at fáa H-bygningin lidnan og tiknan í nýtslu.

Við hesum viðmerkingum tekur nevndin undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Fíggjarnevndin, 2. november 2023

Eyðgunn Samuelsen formaður	Beinir Johannesen næstformaður	Bjarni Hammer
Eirikur í Jákupsstovu	Hanna Jensen	Magnus Rasmussen
	Steffan Klein Poulsen	